# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Eg havi virðing fyri Ségoléne Royal og hennara veljarum og verði forseti hjá øllum fransmonnum*
*(Nicolas Sarkozy)*

# Frakland skal aftur á pallin



*Nývaldi franski forsetin, Nicolas Sarkozy, var fegin um valsigurin*

**Størri franskur leiklutur í ES, betri samband millum París og Washington og broytingar á franska arbeiðsmarknaðinum verða nakrar av avleiðingunum av franska forsetavalinum**

- Franska fólkið hevur valt at gera upp við gamlar reglur, hugsjónir og vanar. Franska fólkið hevur valt broyting, og hana fari eg at seta í verk.

Tað var høvuðslyftið hjá nývalda franska forsetanum, Nicolas Sarkozsy, tá hann í gjárkvøldið takkaði sínum veljarum fyri sigurin. 84 prosent av teimum fronsku veljarunum høvdu tá verið í valhølunum, og 53 prosent høvdu sett kross fyri Nicolas Sarkozy. Hini 47 prosentini høvdu valt Ségoléne Royal.

- Eg havi virðing fyri frú Royal og hennara hugsjónum. At virða hana er at virða tær nógvu milliónirnar av fransmonnum, sum atkvøddu fyri henni. Ein franskur forseti skal elska allar fransmenn, segði Sarkozy í takkarrøðuni, sjálvt um hansara viðhaldsfólk høvdu ilt við at fagna honum, tá hann nevndi navnið á mótvalevninum.

Ségoléne Royal var eisini skjót at ynskja Sarkozy tillukku við sigrinum, og hon gjørdi greitt, at hon fer at halda fram við stríðnum fyri sínum politisku hugsjónum.

### Virkið Frakland

Millum teir fyrstu at ynskja Nicolas Sarkozy tiillukku við forsetavalinum var George W. Bush, forseti, og Sarkozy brúkti eisini ein part av sínari takkarrøðu til at umrøða júst USA og viðurskiftini millum París og Washington.

- Eg skal siga øllum amerikanarum, at Frakland fer altíð at standa við teirra lið, tá teir hava tørv á tí. Men eg skal eisini siga, at rættir vinir hava virðing fyri sjónarmiðunum hjá hvør øðrum, segði Sarkozy. Hann hevði eisini eina áheitan á USA í sambandi við veðurlagsbroytingarnar:

- Ein stór tjóð sum USA eigur ikki at forða stríðnum ímóti tí veksandi hitanum á Jørðini, men eigur tvørturímóti at ganga undan í hesum stríði, tí tað er lagnan hjá mannaættini, vit tosa um, segði nývaldi franski forsetin í sínar fyrstu beinleiðis uttanríkispolitisku staðfesting eftir valsigurin.

Politiskir eygleiðarar í París siga, at við Nicolas Sarkozay á odda verður Frakland meiri virkið á uttanríkispolitiska pallinum, enn tað hevur verið undir Jacques Chitac. Eitt nú vænta teir, at Frakland fer at gera meiri vart við seg í ES.

### Broytingar

Men tað eru fyrst og fremst lyftini um innanríkis broytingar, sum hava givið Nicolas Sarkozy forsetaembætið. Hann hevur eitt nú lovað at broyta viðurskiftini á arbeiðsmarknaðinum, so fransmenn sleppa at arbeiða meiri og at forvinna meiri, og hann hevur sagt, at hann er til reiðar at taka dystin upp við fakfeløgini fyri at fáa síni sjónarmið ígjøgnum.

Hann hevur eisini lovað ein strangari innflytarapolitikk, og hann krevur, at teir fronsku muslimarnir laga seg eftir franskari lóggávu og fronskum viðurskiftum. Í takkarrøðuni fingu tær muslimsku kvinnurnar fingu eina serliga heilsan frá honum:

- Frakland fer ikki at svíkja kvinnur, sum eru dømdar at ganga í burkha.

# Afghanskir hermenn skjóta amerikanskar hermann

**Afghanar eru í øðini um, at umleið 50 sivilfólk lótu lív í einum amerikonskum álopi í síðstu viku**

Amerikanarar og serliga amerikanskir hermenn eru illa umtóktir í Afghanistan í hesum døgum, og tað sást serliga í gjár, tá ein afghanskur stjórnarhermaður fór at skjóta eftir amerikonskum hermonnum uttan fyri eitt fongsul í høvuðsstaðnum Kabul. Tveir amerikanskir hermenn doyðu, og tveir aðrir vórðu særdir, áðrenn aðrir hermenn skutu tann afghanska hermannin.

Ta fyrstu løtuna ljóðaði, at talan kanska var um ein uppreistrarmann í hermannabúna, men leiðslan á hermannaskúlanum í Kabul váttaði seinni, at maðurin var úr stjórnarherinum. Eygleiðarar siga, at tilburðurin gevur eina mynd av, hvussu spent støðan í Afghanistan er.

Aðrastaðni í Afghanistan vóru stórar mótmælsigongur um vikuskiftið, har fólk mótmæltu tilburðinum í síðstu viku, sum kostaði umleið 50 sivilfólkum lívið. Amerikanska herleiðslan hevur lovað at kanna tilburðin.

## STUTT SAGT

### Fara til Obama

Fleiri misnøgdir republikanarar í USA, sum hava mist álitið á George W. Bush, forseta, hava nú valt at styðja demokratiska senatorin Barrack Obama, sum ætlar sær at stilla upp á forsetavalinum næsta ár. Teirra millum er Matthew Dowed, sum var ein av teimum fremstu fyriskiparunum hjá republikanarunum á valinum í 2004. Hann sigur við blaðið The Times, at hann kann ikki góðtaka øll mistøkini, sum forsetin hevur gjørt í sambandi við kríggið í Irak, og at hann tí hevur ventrepublikanarunum bakið. Matthew Dowed leggur afturat, at eftir hansara tykki er Barrack Obama ein politikari, sum hevur evni til at savna amerikonsku tjóðina aftur, sum hann tekur til.

### Datt niður

Níggju hermenn úr friðarvarðveitandi herdeildini MFO doyðu, tá flogfar teirra datt niður í Sinaioyðimørkini í Egyptalandi í gjár. Egyptisku myndugleikarnir siga, at átta av hermonnunum vóru úr Fraklandi, og ein var úr Kanada. Sagt verður, at flogskiparin royndi at neyðlenda á einum motorvegi, men at flogfarið bar bið ein lastbil, tá tað skuldi seta seg. Teir níggju hermenninir vóru í MFO-deildini, sum er ein óheft herdeild, sum bleiv skipað í sambandi við friðarsáttmálan millum Egyptaland og Ísrael í 1979.

### Fangar ringa viðferð

Tveir ísraelskir mannarættindafelagsskapir vilja vera við, at ísraelska fregnartænastan pínir palestinskar fangar, sum tænastan fær til avhoyringar. Í einari frágreiðing skriva felagsskaparnir, at viðurskiftini hjá fangunum eru syndarlig, og at teir verða illa viðfarnir á ymsan hátt. Frágreiðingin er grundað á samrøður við 73 palestinskar fangar, men ísraelska løgmálaráðið hevur víst skuldsetingunum um píning aftur og sigur tær vera púra burtur úr vón og viti.